# Kórstevnan 2000 stendur fyri durum

Á stóru kórstevnuni fyri trimum árum síðan, sum hevði heitið "Kórstevnur Føroya tríati ár" varð avgjørt, at "Kórstevnan 2000" skuldi verða næsta stevnan í høvuðsstaðnum, her sum hetta árliga kórstevnuhald byrjaði í 1967. Stevnan byrjar mikukvøldið 31. mai og endar við konsert og veitsluhaldi leygardagin 3. juni.

Tað hevur kanska verið hildið, at stevnurnar úti um landið eru festligari, av tí at kórsangararnir tá búgva á skúlum og tí eru saman alt stevnuhaldið; men í ár kann Havnin bjóða somu umstøður, við tað at *Eysturskúlin verður karmur um kórstevnuna bæði til samsang og til bústað*

Fyri at geva kórstevnuni nú við túsundáraskiftið eitt breiðari innihald verða tað í ár tveir høvuðskórleiðarar. **John Høybye** er gitin um øll Norðurlond og eisini uttan fyri fyri sítt kórarbeiði og er eisini vælkendur tónlistamaður her í landinum. John hevur fleiri ferðir áður havt okkara kórstevnur um hendur og hevur annars havt sera gott samarbeiði við sín góða vin Frits Johannesen í Fuglafirði og hansara legendariska gentukór.

John Høybye hevur í ár sum aðalverk kosið sær gitna kór- og orkesturverkið Sacred Concert, t.e. Heilag konsert, eftir jazzhøvdingin Duke Ellington. Í hesari útgávuni av verkinum, sum John sjálvur saman við kenda danska tónlistamanninum Peder Pedersen hevur lagt til rættis, hevur kórið ein serligan leikleilut, men verður annars eisini sum upprunaliga framført saman við sopransolisti og stórbandi.

Solo fer svenska jazzsangarinnan **Eleanora Johansson** at syngja, og orkesturspælinum tekur **føroyski úrvalsbólkurin JASPIS** sær av.

Við sínum kóri TRITONUS, sum eisini verður við á kórstevnuni, hevur John Høybye framført hetta verk bæði í USA og úti í Europa.







Hin høvuðskórleiðarin verður norska **Tone Bianca Dahl**. Tone er kend bæði í Noregi og í norðurlendska kórheiminum eitt nú í sambandi við regluligu kórstevnurnar "Nordklang". Tone er lærari í kórleiðslu og musikkteoretiskum greinum á Østlandets Musikkhøyskole, t.e. konservatoriinum í Oslo, og hevur sjálv fleiri kór um hendur. Kendast av hesum man manskórið Den norske Studentersangforening vera.

Á hesari síni fyrstu Føroyavitjan fer Tone B. Dahl at arbeiða við norskum kórtónleiki. Millum annað sleppa kórsangararnir undir hennara hondum at uppliva slíkar perlur sum "Ved Rondane" og "Våren" eftir norska tjóðarkomponistin fram um allar Edvard Grieg.

Upprunaliga var ætlanin, at Tone og John skuldu arbeiða hvør sær við sínari helvt av stevnuluttakarunum; men nú verður hildið, at hugnaligari er við einum felagskóri, soleiðis at sangararnir fáa høvi til at uppliva báðar kórleiðararnar og tað, sum tey hava at bjóða.

Limakórini í Kórsambandi Føroya hava øll fingið fráboðan um og innbjóðing til stevnuna; men **kórstevnan stendur eisini sangarum uttankóra í boði**. Fólk skulu bara flyta luttøkugjaldið upp á 400 kr., sum eisini fevnir um mat og gisting, + 150 kr., um ynski er at vera við til veitsluna aftaná, inn á **konto nr. 4986336 í Føroya Banka ella konto nr. 1271328 í Føroya Sparikassa og leggja navn við**. *Hetta gjørt skulu sangarar skrivliga boða frá til "Kórstevnu 2000" v/ Doru Samuelsen, Handan Á 4, ella ringja til Doru á tlf. 31 48 50. Ringjast kann eisini til skrivara kórsambandsins Palla Askam (tlf. 31 23 06 (arb.) ella 42 43 04 (heima)) ella til formannin Ólav Hátún tlf. 31 18 19.*

Seinasta tilmeldingarfreist er nú sett til týsdagin 24. mai á miðdegi.

**Kórini í Havn og Kórsamband Føroya**

## Fjølbroytt kórkonsert á Kambsdali

Leygarkvøldið 20. mei kl 19:30 verður høvi hjá eysturoyingum at hoyra nógvan ymiskankórsang. Tá fara tey trý kórini Leirvíkar Gentukór, Felagskórið Gøta/Leirvík og Fuglafjarðar Manskór at hava konsert saman í Studentaskúlanum á Kambsdali.

Leirvíkar Gentukór, sum er sett saman av ungum evnaríkum gentum, fer at syngja ymiskar fjølbroyttar sangir - alt frá ABBA til vanligar føroyskar summarsangir.

Felagskórið Gøta/Leirvík hevur eftir hondini nøkur ár á baki. Kórið hevur sangarar úr ymsum bygdum í Eysturoynni, og Eivør Pálsdóttir er solistur í kórinum. Leygarkvøldið fer kórið at framføra sangir eftir Paul McCartney, Richard Rodgers o.o.

Ikki eru manskórini í Føroyum so nógv í tali, men í Fugalfirði hava teir so eitt. Teir fara leygarkvøldið at lata sínar málmklingandi røddir ljóða. Sungnir verða bæði føroyskir og útlendskir sangir. Kórini fara eisini at syngja okkurt verkið saman.

Leirvíkar Gentukór
Felagskórið Gøta/Leivík
Fuglafjarðar Manskór



## Musica Viva konsert í kvøld

*Í kvøld, hósdagin 18. mai kl 19.30 fer tónleikabólkurin Musica Viva at hava konsert í Norðurlandahúsinum. Á konsertini verða kend klassisk stykki framførd eftir Paganini, Schumann, Tjaikovski, Lizst, Halvorsen og Dvorak. Limirnir í Musica Viva eru Jóhannes Andreasen og Stamen Stanchev klaver, Sámal Petersen violin og Nikolaos Kapnas violin/bratsj.*



Viðmerking:

# Hvussu væl loysir fullveldið seg?

Mong eru tey, sum nú spyrja, hvussu tað man fara at ganga at skipa Føroyar sum eitt fullvalda ríki.

Nú er ivin ikki so nógv um, hvørt tað fer at bera til at fáa ein sáttmála í lag við Danmark. Heldur verður hildið, at tað kann hugsast, at hesin sáttmáli fer at vera so vánaligur, at hann fellur til fólkaatkvøðuna.

Lítil orsøk er til at frykta fyri hesum.

Í 1946 sýndu vit øllum heiminum, at tá okkum stóð í boði at taka skilnað við Danmark her og nú uttan tillagingartíð og tilsøgn um ein sáttmála um samstarv, so tóku vit av. Hetta svarar til at fáa eitt tilboð um at leypa út av 10-metur vippuni uttan at hava nakra vissu fyri, at vatn er í hylinum. Tá vístu føroyingar seg sum menn og tóku av hesi avbjóðing.

Politisku eygleiðararnir vóru púra paff av at føroyingarnir vóru so óttaleysir. Líka síðan Stauning í 1930 kom við uppskotinum um fólkaatkvøðu, har føroyingar skuldu taka støðu til um teir vildu vera hjá ella frá Danmark, hevði Jóannes bóndi kravt at tað fyrst skuldi gerast ein sáttmáli, har við heilt greitt fingu at vita treytirnar fyri at fara frá Danmark. Av tí at stjórnin hjá Knud Kristensen í 1946 ikki vildi gera ein slíkan sáttmála, var ætlanin hjá stjórnini at loysingin skuldi standa sum tað stóra skrímslið, og allíkavæl valdu føroyingar loysingina.

Men nú er støðan júst tann, sum Jóannes bóndi í 1930 kravdi at hon skuldi vera. Vit fáa eina semju við donsku stjórnina, har øll ivamál eru komin upp á pláss. Vit koma heilt greitt at síggja, hvørjar treytirnar verða um vit gerast eitt fullvalda ríki.

Eitt sum higartil er komið lítið fram, er tað, at vit sjálvandi eisini mugu fáa at vita, hvussu treytir okkara verða, um so er at vit vraka sáttmálauppskotið. Kunnu vit so rokna við, at vit í allar ævir skulu hava ta skipan, sum vit nú hava?

Hetta er ikki serliga sannlíkt.

Bert fyri at taka ein part av hesum máli.

Nú sigur danska stjórnin, at vit kunnu vera blokkin fyri uttan eftir fýra árum um so er at vit gerast eitt sjálvstøðugt ríki. Próvførsluna fyri hesum skal stjórnin leggja fram á fundinum tann 15. juni.



Men um so er, at stjórnin prógvar, at vit kunnu fáa ein burðardyggan búskap eftir fýra árum um so er, at vit gerast eitt fullvalda ríki, so má hon eisini svara hesum spurningi: Hvussu skjótt kunnu vit so vera blokkin fyri uttan um so er at vit ikki eru eitt fullvalda ríki?

Um so er, at tað er betri fyri búskap okkara at vera saman við Danmark enn at fara frá tí, so átti búskapur okkara sjálvsagt at kunna gjørst burðardyggur skjótari um støða okkara er óbroytt. Eingin orsøk er hjá donsku skattgjaldararnum at gjalda skatt sum fer til ónyttu, og kunnu Føroyar betri klára seg sjálvar saman við Danmark enn sum fullveldi, so má blokkurin kunna skerast niður á 0 eftir tveimum ella trimum árum um vit heldur vilja vera saman við Danmark.

Er tað hin vegin soleiðis, at tað ikki er eins gott fyri búskap okkara at vera saman við Danmark sum at vera eitt sjálvstøðugt ríki, so má niðurskurðurin í blokkinum vera yvir eitt longri tíðarskeið um so er at vit ikki fara frá Danmark.

Men sigur danska stórnin hetta síðsta, so setur hon harvið eisini tøl á, hvussu nógv betri tað hevði verið fyri búskapin í Føroyum at vit gjørdust eitt sjálvstøðugt ríki.

Áhugavert hevði verið at sæð hetta roknistykkið!

Fá munnu tey vera, sum ivast í hvat ið føroyingar fara at atkvøða tá hesir upplýsingar liggja á borðinum.

Einki er tí at óttast fyri, at tann sáttmáli, sum gjørdur verður millum føroyaska landsstýrið og donsku stjórnina, ikki verður samtyktur av føroysku veljarunum.

**Zakarias Wang**




## Villar plantur í Føroyum

*Hefti við yvirliti yvir villar plantur funnar í Føroyum*

Nú summarið nærkast og vit øll gleða okkum til túrar úti í náttúruni, gevur Føroya Náttúrugripasavn út nýggjan plantulista, ið skuldi verið ein góð hjálp hjá øllum, ið ætla sær at hyggja eftir villum plantum í summar.

Anna Maria Fosaa, plantufrøðingur á plantudeildini á Náttúrugripasavninum, hevur skrivað yvirlitið. Yvirlitið byggir á innsavningar á savninum.

Í yvirlitinum fær lesarin nakað at vita um uppruna, títtleika, hædd og útbreiðslu fyri hvørja einstaka plantu. Aftast í yvirlitinum er eitt Føroyakort, og á hesum kortinum sæst, at landið er býtt í 31 økir. Um ætlanin er at fara ein ávísan túr í summar, kann ein hyggja í yvirlitið og skjótt fáa at vita, hvørjar plantur vaksa í júst tí økinum, har leiðin gongur. Yvirlitið finst eisini á heimasíðuni hjá Náttúrugripasavninum www.ngs.fo. Á heimasíðuni er møguleiki fyri at trýsta á eitt ávíst øki og síðan fáa ein lista yvir planturnar í økinum.

Heftið er 11x15 cm til støddar, hevur 25 blaðsíður og finst eisini í eini ensk/ danskari útgávu. Kostnaðurin er kr. 25,-.

Góðan lestrarhug! Koyr yvirlitið í lumman og góðan túr!

# Tann stóri legði fót fyri hin lítla

Við stórum svørtum bókstavum skrivar Dimmalætting, 28. januar 2000, at nú er klárt at bora. Øll andlitini á teimum 32 løgtingsmonnunum strálaðu av gleði og dummheit, nú gjønt ljós er givið til at knúsa alt sjálvstýri og búskap í Føroyum. Tað harmar meg at hava sæð, øll hesi mongu ár, ið runnin eru, síðan eg valdi loysing í 1946, hvussu allir flokkar á tingi hava kappast um at skuldarbinda Føroyar. Undirsjóvartunlarnir eru besta prógvið um hvussu líkasælt alt løgtingið er, eingin undantikin. Koma undirsjóvartunlarnir, sum vinnumálaráðharrin leggur upp til, at kosta í forhold til hvat Gardemoen kostaði norska fólkinum, so vil bara vágatunnilin kosta føroyskt skattaborgaranum minst 2,4 milliardir og tað er mest trúligt at so verður.

Luksus og eitt stórt pengaforbrúk vil altíð elva til vanlukkur og tað er tað, ið vinnumálaráðharrin leggur upp til. Ruinin í Leynum, sum okkara politikarir vóru pápar til, tá Føroyar fóru á húsagang, sigst at hava kosta okkum skattaborgarum 50 milliónir. So kann forstandi siga einum og hvørjum, hvussu nógv restin, sum vinnumálaráðharrin borðreiðir við, vil koma at kosta.

Vóru kommunurnar í Vágum og Klaksvík fíggjarliga sterkar, við einum fólkagrundarlagið, sum ikki var nógv undir 20.000 hvør kommunan, so kundu tær verði við til at fíggja ein part av undirsjóvartunlinum, men so er ikki. Tær allarflestu kommunurnar í Føroyum, eru skuldarbundnar, eisini tær í Vágum og Klaksvík og tað eru tær sum, uttan at kenna búskaparligu fylgjurnar, rópa harðast upp um at fáa undirsjóvartunlar. Tingmanningin í Vágum og Klaksvík, hava í langar tíðir lametera sum býttlingar fyri at fáa yvirtalað samgongu og andstøðu til at verða við í einari verkætlan, sum hvørki fólkagrundarlag ella fíggjarliga orku hevur. Peningurin, sum bæði undanfarna og sitandi landstýri í áravís hevur knossast við at fingið til vega, sigst at verða komið upp á 160 milliónir. Tá tær 160 milliónirnar eru uppbrúktar, hvat so? Vinnumálaráðharrin hevur fyri langt síðani avdúka, hvussu lítið skil hann hevur fyri búskapið, tá hann fær seg til, av fullum álvara, at mæla til at fáa gjørt ein undirsjóvartunnil, sum skal ganga frá Toftum í Eysturoynni til Hvítanes á Streymoynni. Øll framskygd fólk síggja at tørvur verður á tveimum flogvøllum og um tit vilja skattaborgaranum væl, droppa tit øllum tonkum um gerð av undirsjóvartunlum. Brúki heldur peningin til nýggjan flogvøll ella til at fáa uttanlandaskuldina niður um tær 4-5 milliardir, sum hon sigst at verða á.

Í kvøld, 18. apríl hoyrdi eg at fígging til vágatunnilin var fingin til vega. Tað hevði verið áhugavert hjá okkum skattaborgarum at sæð í bløðunum, hvussu tann fíggingin sær út. Eitt vita vit, við hundrað prosents sikkurheit, at tað verða ikki bummpengarnir, ið koma at gjalda undirsjóvartunnilin aftur, tí fólkagrundarlagið er ikki til staðar.

Tað skulu túsundtals akfør um dagin til at niðurgjalda so stóra íløgu, sum ein tunnil um Vestmannasund kemur at vera. Eisini hoyrdist sama kvøldið, at fólk skuldi vera rædd fyri fullveldinum. Í mínari verð tykist tað ótrúligt, líka ótrúligt sum tað, ið hoyrist dagliga, at uttan milliardina frá Danmark er okkum ikki lív lagað. Allan handa sangin kunnu teir billa inn í smábørn og ikki inn í vaksin fólk, nú vit eru inni í ár tveytúsund. Líknandi sangur hoyrdist nógv av í 30'unum tá eg varð ungur, at um ikki Danmark forbarmaði seg yvir okkum við at keypa vín og frukt fyri tann fiskin, ið vit seldu til miðalhavslondini, so sótu vit køld og svong. Tann, sum trýr at danir lata okkum eina milliard av kærleika til Føroyar, er ógvuliga bláoygdur. Í 1918 taka íslendingar fullveldi, tað vil siga so mikið, at vit føroyingar standa 82 ár aftan fyri íslendingar, tað skal ikki vera nógv skeivt, at so er.

Eg kom at kenna Ísland ógvuliga væl, bæði fyri, undir og eftir kríggið. Ísland hevur ment seg ár eftir ári, alla tað tíð eg havi kent landið og síðan teir slitu seg leysar frá Danmark, er tað vorðið eitt av heimsins mest framkomnu londum. Tað er nógv fyri, man eigur sítt hús og heim, men landið hevur sambands- og javnaðarflokkurin latið staðið opið fyri dønum at hagreitt, sum teimum lystir. Hava danir hug at selja Føroyar, líknandi sum 1917 tá danir seldu Vestindisku Oyggjarnar til USA, ja, so góðtekur Sambandið og javnaðarflokkurin eisini tað, uttan at blunka.

Nú eru smá 54 ár liðin, síðan eg valdi loysing, 14. september 1946. Eftir hógvi stríð og klandur av tí sendinevnd, ið fór til Danmarkar eftir kríggið í 1945, gjørdust danir troyttir av at hava føroyingar gangandi malandi á Kristiansborg, sum ótangar. Danir settu tí eitt greitt uppskot at taka støðu til, soljóðandi: ynskja tygum loysing ella stjørnaruppskoti. Úrslitið bleiv klárt, loysingin vann valið, við 5638 atkvøðum og stjørnaruppskotið fall við 5454 atkvøðum. Hetta úrslit toldi hvørki sambandið ella javnaðarflokkurin, ei heldur danir. Nú fer svikarmyllan í gongd, vælmannað av Tvøroyra-, javnaðar og sambandspolitikarum, við hjálp frá dønum. Orlogsskipið Thetis fekk í skundi ordra at sigla til Føroya, at niðurberja okkum loysingarfólk. Kristian kongur, ið lá á deyðastrá, hálvur í ørviti bleiv eisini brúktur til at niðurberja føroyingar til tað lógliga val, sum danir sjálvir høvdu biðið føroyingar taka støðu til 14. september 1946.

Frá apríl 1940 til mei í 1945 var alt samband millum Føroyar og Danmark slitið og hóast føroya løgting ikki hevði fult harradømi á tí enska valutainum, sum tey føroysku skipini forvunnu við at selja fisk á tí bretska marknaðinum, fingu teir nokk til at vit so spakuliga sluppu burtur úr tí vesaladómi, sum vit høvdu verið bundnir til í hundradavís av árum, har danir einsamallir høvdu havt ræði í Føroyum. Fyrst tá kom ferð á búskapin, sum hvørki fyri ella eftir tða, hevu blóma sum tað tíðina bondini millum Føroyar og Danmark vóru slitin. Tað kann sláast fast við sjeytumma seymi. Minnist eg rætt, áttu vit 80 milliónir í bretskum bankum í 1945, skuld var eingin.

Fimmhálvtrýss ár seinni hava vit skuldarbundi Føroyar til at gjalda 323 milliónir árliga, í eitt tjúguára tíðarskeið, til tann danska statskassan og eina skuld hangandi yvir okkara heysar uppá 4-5 milliardir, ja soleiðis hava hesi 54 árini roynst, meðan danir og sambandið við javnaðarflokkinum á odda hava arbeitt sum úlvar á skóg ímóti fólkaviljanum 14. september 1946. Er tað ikki upp á tíðina at fólkaviljin 14. september 1946 verður til veruleika í ár 2000, áðrenn nøkur onnur fólkaatkvøða verður send út til fólkið.

Eg kann minnast eldri fólk, sum nú hvíla undir grønu torvu, hvussu ótrygg tey vóru, nú kríggið fór at halla í 1945. Við tí politikki, ið sambandið og javnaðarflokkurin høvdu ført øll krígsárini, føldi eg meg nógv tryggari tað tíðina eg sigldi vandasjógv undir krígnum, enn við at lata framtíðarstøðu Føroya upp í hendurnar á Sambandinum og javnaðarflokkinum. Tað er eisini prógva at hesi 55 árini eftir kríggið, tá bondini millum Føroyar og Danmark vóru knýtt saman, hava verið sera dýr fyri okkum føroyingar. Eg eri vísur í, at um forholdið Danmari–Føroyar bleiv hegnisliga lagt fyri ein altjóða rætt, so varð tað Danmark, sum hevði staðið sum tapari, við at hava verið tann stóri, ið spenti beint fyri tí lítla, sum vann frælsi 14. september 1946.

**Mass Andrias Fitjar**
**Vestmanna 14. mei 2000**